## Yvirgangsleiðari fallin

Myndugleikarnir í Indonesia kunngjørdu í gjár, at malaysiski yvirgangsleiðarin Azahari bin Husin fall í bardaga við løgregluna fyrradagin.

Løgreglan hevði fingið frænir av, at yvirgangsmenn hildu til í einum húsum í býnum Malang á oynni Java. Tá løgreglan leyp á húsini, skutu menn aftur-ímóti, og tá bardagin var liðugur, varð líkið av tí 42 ára gamla Azahari bin Husin funnið inni í húsunum, skrivar AP. Tað er kortini ikki greitt, um hann bleiv skotin, ella um hann doyði fyri egnari hond. Indonesiska løgreglan hevur fyrr sagt, at Azahari hevði altíð eitt bumbubelti um miðjuna, so hann skuldi ikki verða tikin á lívi.

Myndugleikarnir í Indonesia vilja vera við, at Azahari var ein av leiðarunum í yvirgangsfelagsskapinum Jemaah Islamiyah, sum hevur samband við al-Qaeda. Hildið verður, at hann var millum teirra, sum skipaðu fyri atsóknini, sum kostaði 202 mannalív á oynni Bali í 2002. Hann varð eisini settur í samband við eina atsókn á Bali fyri einum mánað síðani. Ta ferðina doyðu 20 fólk.

## Semingsmaður gevst

Jayantha Dhanapala, sum hevur verið samráðingarleiðari hjá srilankisku stjórnini í samráðingunum við teir tamilsku tikararnar, boðaði í gjár frá, at hann gevst sum samráðingarmaður.

Við hjálp frá norskum semingsmonnum samdust stjórnin og tamilsku tikararnir um eina friðaravtalu fyri trimum árum síðani. Avtalan hevur kortini ikki forðað fyri harðskapi, og Jayantha Dhanapala hevur í seinastuni roynt at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið, men til fánýtis. Nú hevur hann so kunngjørt, at hann gevst. Avgerðin kann hava samband við, at forsetaval verður í Sri Lanka um eina viku, og at valevnið hjá stjórnarflokkinum hevur skotið upp at herða framferðina ímóti tamilsku tikarunum.

Jayantha Dhanapala hevur fyrr arbeitt sum diplomatur hjá ST, og sambært altjóða tíðindastovunum hevur hann ein dreym um at taka við aðalskrivarastarvinum har, tá Kofi Annan fer frá næsta ár.

## Myrdi sjúklingar

Ákæruvaldið í Týsklandi hevur ákært eina 27 ára gamla kvinnu fyri at hava beint fyri níggju sjúklingum á einum ellisheimi nærhendis Bonn.

Sambært ákæruritinum kvaldi hon níggju kvinnur við einum kodda ella einum handklæði. Kvinnurnar vóru í aldrinum frá 78 til 93 ár, og tær vórðu fyribeindar í tíðarskeiðinum frá november í 2003 til apríl í ár.

Tann 27 ára gamla kvinnan viðgekk seg seka, tá hon bleiv tikin. Hon hevur greitt frá, at hon drap fýra konur, tí hon orkaði tær ikki, og at hon beindi fyrio fýra øðrum, so tær kundu sleppa undan at líða. Tann seinasta bað sjálv um at sleppa hiðani, segði kvinnan.

Verður hon funnin sek í at hava myrt tær níggju kvinnurnar, fær hon helst lívlanga fongsulsrevsing.

## Funnu gamla grøv

Norskir fornfrøðingar hava funnið eina 1600 ára gamla grøv einar 30 metrar frá sjónum við Farsund í Suðurnoregi. Grøvin hevur ivaleyst verið partur av einum gomlum gravstaði, sum varð lagdur undir heilt í sambandi við vegarbeiði í fimmtiárunum.

Sambært fornfrøðingunum er talan um grøvina hjá einari kvinnu, og tað er greitt, at hon man hava havt eina týðandi støðu í sínum samfelag. Í grøvini hava fornfrøðingarnir funnið lutir úr gulli og silvuri umframt glasperlur og ymsar lutir úr bronsu og jarni, og tað vísir, at kvinnan hevur havt eina serstøðu, siga fornfrøðingarnir.

Kvinnan lá ballað inn í klæði, sum annaðhvørt eru úr ull ella silki, og sambært fornfrøðingunum er tað sjáldsamt at finna so gomul klæði.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Hildu tað vera fýrverk

**Brúdleyp var á einum gistingarhúsi í Amman fyrrakvøldið, so fleiri hildu bumbubrestirnar vera fýrverk. Løtu seinni høvdu 67 latið lív.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Umleið 300 fólk vóru í brúdleypi í gildissalinum á Radisson SAS-hotellinum í Amman fyrrakvøldið. Bráðliga var alt í einum ruðuleika. Ein sterk bumba var brostin inni í sjálvum salinum. Eingin hevði varnast tann óbodna gestin, sum var komin innar við einum bumbubelti um miðjuna.

-Vit hildu tað vera fýrverk, men so sóu vit blóð og deyð fólk, segði ein av brúdleypsgestunum við tíðindastovuna AP. Løtu seinni brast ein bumba á Grand Hyatt-gistingarhúsinum, og uppaftur eina løtu seinni brast ein á gistingarhúsinum Days Inn.

Løgreglubilar og sjúkrabilar vóru skjótir til tey trý gistingarhúsini, og umleið ein tíma seinni varð kunngjørt, at tær tríggjar bumburnar høvdu kravt 67 mannalív, og at meiri enn 100 vóru særd.

Tey trý gistingarhúsini eru í Jebel-býarpartinum, og evropearar, amerikanarar og ísraelsmenn gista vanliga har. Eftirlitið við gistingarhúsunum er eisini sera strangt. Eitt nú koyra løgreglubilar fram við teimum fýra ferðir um tíman. Ísraelska blaðið Haaretz visti í gjár at siga, at fleiri ísraelsmenn høvdu búð á Radisson SAS-gistingarhúsinum, men at ísraelsku myndugleikarnir fluttu tey haðani nakrar fáar tímar undan bumbuatsóknini. Orsøkin var sambært blaðnum "ein neyv trygdarfráboðan", sum blaðið orðaði tað. Sum skilst vórðu aðrir gestir ikki ávaraðir, skrivar NTB.

Jordansku myndugleikarnir hava leingi lagt seg eftir at forða fyri yvirgangi í landinum, millum annað tí at nógvir irakar eru komnir hagar síðani innrásina í Irak. Jordan er eisini trúgvur stuðul hjá USA, og í august vórðu rakettir skotnar eftir amerikonskum herskipum, sum lógu við bryggju í Akaba.



*Ein særdur maður verður fluttur út til ein sjúkrabil uttan fyri Grand Hyatt-gistingarhúsið.*

# Alt bendir á al-Zarqawi

**Bæði yvirgangsserfrøðingar og jordansku myndugleikarnir halda, at tað var Abu Musab al-Zarqawi, sum skipaði fyri atsóknunum í Amman.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrapartin í gjár átók al-Qaeda sær ábyrgdina av bumbunum á teimum trimum gistingarhúsunum í Amman. Tað kom ikki óvart á nakrar, tí longu framman undan høvdu tey flestu illgruna til ein ávísan mann, Abu Musab al-Zarqawi.

Jordanskar keldur søgdu í gjár, at hann hevur fleiri ferðir roynt at fremja yvirgang í Jordan, men at myndugleikarnir hava avdúkað ætlaninar hvørja ferð. Men hesa ferð eydnaðist tað honum.



*Abu Musab al-Zarqawi.*

### Men hvør er hann?

Abu Musab al-Zarqawi er sjálvur jordani. Har varð hann dømdur 15 ára fongsul í 1996, tí hann hevði roynt at fella kongsvaldið, men trý ár seinni varð hann latin leysur. Í 2002 dømdi ein jordanskur dómstólur hann til deyða, tí hann hevði myrt ein amerikanskan diplomat og fyri at hava lagt ætlanir um álop á ísraelsk og amerikonsk mál.

Men hesa ferð var Abu Musab al-Zarqawi ikki í rættinum, tí hann var langt síðani farin úr Jordan. Hann hevði funnið sær eitt nýtt stríðsøki, Irak, og amerikanararnir vilja vera við, at tað er hann, sum skipar fyri mótstøðuni har. Teir vilja eisini vera við, at hann er ein av næstu monnum bin Ladens.

Men hann hevur ikki gloymt Jordan. So seint sum í fjør avdúkaði jordanska fregnartænastan, at al-Zarqawi hevði lagt eina ætlan um at søkja at forsætismálaráðnum og amerikonsku sendistovuni í Amman, og at hann ætlaði at søkja at fleiri málum í býnum við drepandi, evnafrøðiligum vápnum.